


*Jugoslav Djumic og Neistin hava verið omaná í vetur, men spurningurin er, hvør verður omaná í steypafinaluni hjá monnum, har alt skal avgerast í einum dysti*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Annað ættarlið í finaluni

**HONDBÓLTUR** Meðan Neistin er triðja árið á rað í finaluni, eru 25 ár síðani KÍF var har síðst – og fýra av spælarunum hjá kollfirðingum eru synir spælarar frá finaluni afturi í 1986

Hilmar Jan Hansen

Í steypafinaluni hjá monnum hevur Neistin møguleika at taka triðja sigurin á rað. Hesa ferð kemur mótstøðan úr Kollafirði, og Neistin má liva við, at favoritt-stempلið situr á teimum bláu og ikki KÍF.

– Vit eru oddalið og hava fleiri royndir frá steypafinalum enn KÍF. Um tað so motiverar ella leggur eyka trýst á okkum, kann sum so gera tað sama, um vit duga at brúka tað til okkara fyrimun, sigur spælandi venjarin hjá Neistanum, Ingi Olsen, ið hevur stóra virðing fyri KÍF.

– Kollfirðingar hava argað okkum øgiliga illa. Vit hava vunnið allar dystirnar ímóti KÍF, men tað hevur ikki verið lætt, og í tí eina dystinum høvdu teir okkum í sekkinum og skuldu binda fyri, tá tað akkurát eydnaðist okkum at sleppa uppaftur.

Neistin hevur verið oddalið allan vetur, samstundis sum KÍF hevur verið klárt besta liðið av restini. Ingi Olsen staðfestir, at ein steypafinala heldur ikki er sum aðrir dystir, so tí er ikki vist, at stigatalvan er so avgerandi.

– Allarhelst hava vit eitt betri lið enn kollfirðingar, men teir eru ungir og øgiliga raskir, so vit mugu vera fokuseraðir og klárir, sigur Neista-venjarin.

## Fólk eru spent

Ein hin besta myndin av, at KÍF ikki hevur somu steyparoyndir sum Neistin, er ættartalvan hjá fýra av núverandi spælarunum á liðnum. Ási Dam, Emil Dam, Pætur Johannesen og Rúni Joensen, sum eru á liðnum hesa ferð, eru synir ávikavist Jákup Dam, Kristian Martin Dam, Hannis Johannesen og Ragnar Joensen, ið allir vóru á liðnum í 1986, tá KÍF tapti ímóti Kyndli við bara einum máli, 23-24.

– Tað er deiligt at vera í finaluni, og vit eru sera spentir. Tað sama er fólkið í Kollafirði, tí allastaðni spyrja tey um finaluna og ganga øgiliga høgt upp í tað. Hetta er ein dystur, sum skal avgerast, og tað er bara hesin eini kjansurin, tú hevur, sigur venjarin hjá KÍF, Jan Ottosen.

– Vit hava hvørja ferð ímóti Neistanum fingið argað teir í eina góða løtu, men eg ivist í, um tað verður nóg mikið hesa ferð. Helst noyðast vit at spæla 100 prosent væl allan dystin á tamb, tí ímóti Neistanum hevur eingin ráð til at taka sær av løttum.

KÍF-venjarin væntar góðan stuðul frá trúgvu og harðmæltu stuðlunum úr Kollafirði, umframt at hann væntar annan stuðul við: – Vit eru »underdogs«, og tí fara óivað eisini mong onnur at halda við okkum, sigur Jan Ottosen.

hilmarjan@sosialurin.fo




*Kvinnurnar hjá Mjølnir eru nú trý stig framman fyri næstu liðini, eftir at tær í gjárkvøldið vunnu á Ternuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Mjølnir styrkir oddastøðuna

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Við sigri á Toftum í gjárkvøldið syrgdu kvinnurnar hjá Mjølnir fyri, at tær nú eru trý stig framman fyri næstu liðini. SÍ vann í Kollafirði og er enn væl við í oddastríðnum

Hilmar Jan Hansen

Kvinnurnar hjá Mjølnir halda framvegis ferðina heilt har frammi og eru greitt oddalið í løtuni. Í gjárkvøldið var Mjølnir á Toftum og spældi ímóti Ternuni, og gjørdist talan um ein tryggan 3-0 sigur.

Bæði tey fyrstu settini fylgdi Ternan væl við upp til 16 ella 17, men so setti Mjølnir ferðina upp, undirstrikaði rína rutinu og avgjørdi settini. Hóast triðja sett endaði við somu sifrum sum hini bæði, 18-25, var kortini munur á, tí her leyp Mjølnir beinanvegin avstað og var eitt skifti á odda 12-4, áðrenn Ternan kom eitt sindur meira við, tá bæði lið ímóti endanum eisini lótu spælararnar á bonkinum sleppa upp í part.

Í hinum dystinum í gjárkvøldið skuldi SÍ syrgja fyri at koma aftur á kósina, samstundis sum tað ráddi um ikki at missa í mun til liðini omanfyri, Mjølnir og Fleyr. SÍ var í Kollafirði og spældi ímóti KÍF, og har eydnaðist at fáa ein 3-0 sigur til høldar.

Tað gekk rættiliga javnt á í fyrsta setti, har liðini fylgdust langt uppeftir, men ímóti endanum fór SÍ avstað og vann 25-20. Í øðrum setti líktust SÍ-kvinnurnar meira sær sjálvum og vunnu rímiliga trygt, men í triðja setti kom KÍF afturíaftur eina løtu, eftir at SÍ fyrst fór nokk so fitt framum, men so fór SÍ avstað aftur og vann settið og dystin.

Sostatt er SÍ framvegis á triðja plássi, við sama stigatali sum Fleyr, men tó við einum dysti meira.

## Næstu dystirnir

Eftir sigrarnar hjá Mjølnir og SÍ í gjárkvøldið, er eitt sindur av trýsti lagt á hini bæði liðini í fremstu kvartettini, Fleyr og ÍF. Og júst tey bæði hittast á Kambsdali í morgin, har ÍF við sigri veruliga kann sleppa upp í part, samstundis sum Fleyr við sigri veruliga fær oddasessin í eygsjón.

Sunnudagin spæla júst Mjølnir og ÍF, samstundis sum bæði Fleyr og SÍ hava dystir, sum á pappírinum síggja yvirkomiligir út, so tá vikuskiftið er av, kann toppurin bæði verða spjaddur ella enn meira samankroystur.

Hjá monnunum eru tríggir dystir, og Mjølnir og SÍ, sum eru ávikavist næst- og triðfremst, eru partur av tveimum teirra. Í kvøld skulu klaksvíkingar til Sørvágs at spæla ímóti SÍ, og sunnudagin tekur Mjølnir ímóti oddaliðnum, ÍF.

Megnar Mjølnir at vinna hesar báðar dystirnar, nærkast FM-finalan munandi, men vinnur SÍ sínar báðar dystir, kann alt sunnukvøldið aftur síggja út, sum tað gjørdi síðsta sunnukvøld.